## Ónøgd við venjaran

Brøndby-fjepparar gjørdu um vikuskiftið vart við sína ónøgd við venjaran Kent Nielsen. Brøndby tapti 4-2 á heimavølli ímóti Esbjerg, og tað fekk nakrar fjepparar at gera vart við seg. "Nielsen raus", róptu fjepparar, men venjarin leggur líka í. - Eg ætli mær ikki at fyrihalda meg til slíkt. Eg hugsi um tað, sum eg kann ávirka á vøllinum, sigur Kent Nielsen við Ekstrablaðið.



## Valencia áhugað í russara

Russiski álopsspælarin Roman Pavlyuchenko sleppur ikki rættiliga á liðið í Tottenham, og nú verður tosað um, at stóri russarin skal skifta felag í januar mánaði. Eitt felag, sum sigst verða áhuga í Pavlyuchenko er spanska toppliðið Valencia. Tottenham skal vera sinnað at selja russaran fyri umleið 125 milliónir krónur, og tað kann helst minka um spanska áhugan fyri russaranum.



Gull í World Cup! Sigurin hjá Pál Joensen var stórur, og lagið var av tí besta. Men longu mikukvøldið er næsta kappingin á skránni, og tá verður farið eftir World Cup-metinum, sigur Pál sjálvur

# Rom er langt síðani

**Síðani í summar hevur avrikið í Rom riðið Pál Joensen sum ein marra. Leygardagin varð marran jarðað, og nú stendur níggju ára gamla metið hjá Grant Hackett fyri framman**




Jákup Mørk

- Júmen hetta er bara ordiliga deiligt. Eg betraði mína bestu tíð hampuliga nógv, og eg vann gull, so sjálvandi er tað deiligt.

- Men tað besta ío hesum var nokk at vinna á teimum, sum havi kappast ímóti so leingi. Romanovich og Mads Glæsner hava leingi havt munin á mær, men hesa ferð megnaði eg so at vinna, og tað er kanska tað besta av tí heila.

Soleiðis segði Pál Joensen, tá hann umvegis telefonina var gestur hjá Hvonn Live á Rás2 leygarkvøldið.

Nú nevnir tú sjálvur Mads Glæsner. Hann plagar at vera framman fyri teg, men hesa ferð var stórur munur aftur til hansara. Hvussu ber tað til?

- Hann svam langt frá sínari bestu tíð, og hann er kanska ikki ordiliga í kappingarformi beint nú. Men hetta er so fyrstu ferð, at eg havi vunnið ímóti honum, og so veit hann tað. Tað er í øllum førum gott hjá mær, at eg veit, at hann kann takast.

Hvat gjørdi tú øðrvísi sjálvur í mun til aðrar kappingar, sum tú hevur svomið?

- Tað er nokk bara tað, at formurin er sera góður í løtuni. Og alt tað taktiska og tekniska riggaði bara, sum tað skuldi.

### Vaskaði vónbrotið

Fyrr í ár var talan um stórt vónbrot hjá Pál Joensen, tá hann »bert« gjørdist nummar 17 í heiminum, tá HM var á skránni.

Aðra staðni í blaðnum sigur svimjiforsetin, at úrslitið í Moskva var ein fantastisk uppreisn eftir vónbrotið fyrr í ár, og tað var eisini nakað, sum Pál sjálvur staðfesti leygarkvøldið.

- Hetta var rættiliga upplyftandi í so máta. Tað var, sum var alt bara keðiligt eftir Rom, sum var eitt stórt vónbrot hjá mær. Eftir hetta havi eg ikki svomið so væl, og tað hevur heldur ikki gingið nakað serligt undir venjing. Talan hevur verið um eitt stórt vónbrot síðani, men tað er alt vaskað burtur nú.

Og tíðin var eisini somikið góð, at talan gjørdist um norðurlendskt met. Hvussu kennist tað?

- Tað kennist bara heilt væl. Eg havi havt okkurt norðurlendskt met fyrr, men ongan tíð á 1500 metrum og ongan tíð á stuttbana, so tað er bara fínasta slag.

- Men tað, sum vit fóru eftir, var at klára World Cup-metið, sum altso bara var 3,13 sekund burturi. Tað kláraði eg so ikki, men tað er so eisini tað einasta ringa við kappingini í dag, haldi eg.

Talan var um stóran sigur hjá Pál, men ársins rock'n rollari fekk seinasta orðið í Hvonn Live-sendingini, var hann skjótur at staðfesta, at tað nyttar lítið at leggja seg og njóta sigurin.

- Nú fara vit alt fyri eitt víðari til Stockholm. Og so mugu vit bara vóna, at vit tá klára hatta metið, sum slapp undan okkum í dag, segði Pál Joensen.

## Keypsbannið hjá Chelsea útsett

**Court of Arbitration for Sport (CAS) hevur útsett bannið, sum FIFA dømdi Chelsea, og hetta merkir, at felagið kann keypa leikarar í januar keypsglugganum**

leo@sosialurin.fo

Leo Poulsen

FIFA hevði annars gjørt av, at Chelsea ikki kundi keypa nýggjar spælarar fyrr enn í januar 2011, eftir at franska felagið Lens hevði ákært enska stórfelagið at hava eggjað Gael Kakuta at bróta sáttmálan við Lens.

Tað vóru tey, sum hildu revsingina verða ógvuliga harða og ikki standa mát við »brotsverkið«.

Einki er at ivast í, at Chelsea fer at gera sær dælt av møguleikanum, ikki bert tí at bannið er útsett, men í høvuðsheitinum tí, at felagið missir fýra av sterkastu leikarunum, Drogba, Essien Kalou og Mikel til African Cup of Nations.

Og boðini upp á, hvør stendur á innkeypslistanum hjá Chelsea, eru mong. Og eitt sera gott boð er Athletico Madrid-leikarin Sergio Agülero, sum brillieraði móti júst Chelsea í Champions Leauge týskvøldið.

Eitt annað boð er italienski miðvallarleikarin Di Rossi, og onkur skjýtur enntá upp á Patrick Vieira, sum møguligan defensivan miðvallarleikara.

Ein endalig avgerð er ikki væntandi fyrr enn einaferð í vár, skrivar BBC.

Hvussu er og ikki fer Chelsea helst at gera góða nýtslu av møguleikanum at keypa í januar, tí bann kann framvegis verða sett fyri keypi komandi summar. Fyribils er Carlo Ancelotti og leiðslan í Chelsea sera nøgd við avgerðina hjá CAS.